# Fíggjarmálaráðið

Dagfesting: 24. oktober 2018
Mál nr.: 1700005

**Fylgiskjal 1**

**Javntekstur**

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

| **Galdandi orðingar** | **Løgtingslógaruppskotið** |
|---|---|
| | **§ 1**<br><br>Í løgtingslóg nr. 169 frá 30. desember 1997 um Toll- og Skattafyrisiting, sum broytt við løgtingslóg nr. 147 frá 17. desember 2001, § 1 í løgtingslóg nr. 100 frá 20. desember 2002, løgtingslóg nr. 15 frá 4. mars 2005 og løgtingslóg nr. 31 frá 30. apríl 2015, verða gjørdar hesar broytingar: |
| **§ 25 a.** TAKS og Toll- og skattaráðið kunnu ikki gera, broyta ella taka upp aftur skattaálíkningar seinni enn 1. mai, 1. juni ella 1. juli, alt eftir, nær sjálvuppgávan skal latast inn, 4. árið eftir, at inntøkuárið er lokið. Er freistin fyri at lata sjálvuppgávu inn longd, **jbr.** § 105 í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt, verður fyrningarfreistin tó roknað frá tí degi, freistin at lata inn er longd til. | **§ 25 a.** TAKS og Toll- og skattaráðið kunnu ikki gera, broyta ella taka upp aftur skattaálíkningar seinni enn 1. mai, 1. juni ella 1. juli, alt eftir, nær sjálvuppgávan skal latast inn, 4. árið eftir, at inntøkuárið er lokið. **Fyri mál fevnd av §§ 37 a, 37 b og 118 a í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt er talan um 6. árið eftir.** Er freistin fyri at lata sjálvuppgávu inn longd, **sbrt.** § 105 í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt, verður fyrningarfreistin tó roknað frá tí degi, freistin at lata inn er longd til. |

| | |
|---|---|
| *Stk. 2.* Ynskir skattgjaldarin, at skattaálíkningin verður broytt, skal hesin seinast 3 ár eftir, at inntøkuárið er lokið, leggja fram nýggjar upplýsingar, sum kunnu grundgeva broytingina | *Stk. 2.* Ynskir skattgjaldarin, at skattaálíkningin verður broytt, skal hesin seinast 3 ár eftir, at inntøkuárið er lokið, leggja fram nýggjar upplýsingar, sum kunnu grundgeva broytingina. **Fyri mál fevnd av §§ 37 a, 37 b og 118 a í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt, skulu hesar nýggju upplýsingar verða lagdar fram seinast 5 ár eftir, at inntøkuárið er lokið.** |
| **§ 25b.** Ásetinging í § 25a er ikki galdandi (..)<br><br>3. Um skattaálíkningin er ein avleiðing av einari skattaálíkning hjá hjúnafelaga, sum hin skattskyldugi var sambúgvandi við, tá inntøkuárið var úti, **jbr.** § 4 í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt, viðvíkjandi tí sama ella øðrum inntøkuári. | **§ 25b.** Ásetinging í § 25a er ikki galdandi (..)<br><br>3. Um skattaálíkningin er ein avleiðing av einari skattaálíkning hjá hjúnafelaga, sum hin skattskyldugi var sambúgvandi við, tá inntøkuárið var úti, **sbrt.** § 4 í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt, viðvíkjandi tí sama ella øðrum inntøkuári. |
| | **§ 2**<br><br>Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2019. |